## DAGSINS MEINING

### Álvarslig hóttan

Nú ljóðar aftur ávaringarlúðurin í alivinnuni. Illgruni er um herviligu ILA-sjúkuna. Tað er eitt ár síðani sama sjúka varð staðfest í Fuglafirði. Nú verður sjúki fiskurin kannaður í Noregi og vita vit tí ikki við vissu, um talan er um hesa sjúku. Er talan um ILA kann hetta í ringasta føri fáa katastrofalar fylgur fyri í fyrsta lagi alivinnuna og í øðrum lagi føroysku fiskivinnuna sum heild. Tað er tí altumráðandi at forða "sjúkuni" í at breiða seg. Í løtuni er so "bert" talan um Oyndarfjørð, har fiskur doyr við sjúkueyðkennum, sum minna um ILA.

Føroyskir myndugleikar eiga at taka hetta málið í størsta álvara. Verður sjúkan staðfest er tað ringt nokk í sær sjálvum. Men sleppur hon at breiða seg kann hon gerast ein landsumfatandi vanlukka. Og tí má ALT gerast fyri at sleppa undan, at sjúkan rakar onnur alibrúk. Spurningurin er um okkara myndugleikar eru nóg væl mannaðir og fyrireikaðir til at forða eini slíkari sjúku í at breiða seg. Vit hoyra, hvussu bretskir bóndur ikki hava fylgt galdandi reglum og hvørjar avleiðingar tað hevur. Rætt er at taka í egnan barm og spyrja, hvussu stætt er hjá okkum. Rímuligt er at spyrja, um intensiva alingin, sum í dag fer fram er ein hóttan í sær sjálvum! Handfóru vit sama sjúkumál nóg væl, tá ILA varð staðfest í alibrúki í Fuglafirði í fjør? Hava vit gjørt nokk fyri at forða fyri smittu, og hvussu ber tað til, at alibúr í grannaøkinum nú møguliga eru rakt av somu sjúku!

Tað er greitt, at sum støðan er í Europa við munn- og kleyvsótt, kann henda, at ES fer at meta eina føroyska ILA-sjúku sum eina álvarsliga hóttan og harvið seta tiltøk í verk. Ringasta støðan kann verða eitt totalboykott av øllum alifiski og entá øllum føroyskum fiski sum heild. Nú skal man sjálvandi ikki at mála f.... á veggin. Vit mugu tó heldur ikki undirmeta hetta mál. Vit mugu vera ærlig og sjálvkrittisk og tora at seta okkum sjálvum teir røttu spurningarnar. Hvussu ber tað til, at alivinnan, ið hevur forvunnið nógvar pengar, ikki – saman við tí almenna – hevur bygt upp egna rannsóknarstovu til at arbeiða við bæði fyribyrging og uppfylging av sjúkum! At vit skulu senda royndir av landinum og bíða í vikur at kunna staðfesta sjúkuna er ikki rætta mannagongdin ella hugburðurin. Tað ger, at vit taka kanska ikki "sjúkuna" í nóg stórum álvara frá tí, at sjúkutekin koma fyri, til sjúkan er staðfest.

**Sosialurin**

# Okkurt land eitur weekend



*Fiskimaðurin, ið misti svøvnin, og nymfomanurin*

– kanska djúpt inni í okkum sjálvum. Tað var latið upp fyri tí heilt stóra, tá leiktjaldið varð drigið frá á Gamla Meiarínum leygarkvøldið til frumframførslu av nýggjasta sjónleikinum í Føroyum, "Eitur nakað land weekend" eftir Jóannes Nielsen. Spillfeskur leikur, so feskur at orðini vóru ikki tornaði og orðini singlaðu gjøgnum rúmið, so deiliga væluppløgd ópoleraði og gagg.

Leikurin gongur fyri seg á eini sinnissjúkudeild í Føroyum og leikararnir eru svakir so tað brakaði eftirí. Ein skuldi líkasum venja seg við orðalagið. Skal tú røkka skaldarinna løki hjá Jóannes Nielsen, so er neyðugt at vassa eina løtu gjøgnum tað hála og latrinera og hví ikki. Vanligasta prátið umborð á skipið er myrkagrovt. Allastaðni í samfelagnum hoyrir tú orðalistarligar stiklingar, ið stava frá urdriftini, hví so ikki taka tey við inn í skaldskap, nakin og bersøgin akkurát sum tey eru í veruleikanum. Hjá Jóannesi krevur náttúran ikki sín rætt, har mogga tey. Bum og ferdigt við tí!

Leikurin ferðast í fleiri løgum og eg kendi meg so deiliga heima allastaðni., Hvør er ikki svakur og hvar er munurin millum normalt og?

Leikurin er vælskrivaður og tað merkist skilliga, at rithøvundurin fyrst og fremst er lyrikari. Hann er yrkjarin, sum fær orðini at glíða inn í hvønn annan í vøkrum samljóði, lýst av sterkum myndum. Onkuntíð gliðu tankarnir og eg kendi tað sum sat eg mitt í einari góðari yrking.

Vit hava fingið eitt rættuligt leikhús í Havn og leikararnir eru professionellir, tú fer ikki heilt vónbrotin útaftur. Og tá Jóannes skrivar at tí besta, so er løtan fullkomin.

Eg dugi ikki sum kritikari, tí eg smílist enn av leikinum seinasta leygarkvøld og nú er mánadagur um middagsleitið. Flott. Og takk fyri at Eyðun kom aftur til landið.

**Jústinus Leivsson Eidesgaard**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.









petur & petur • 320070